# Afturstig hjá skúlabørnunum



Katrin Dahl Jacobsen, løgtingmaður, spyr Óla Holm, landsstýrismann, um tað er rætt at ferðastuðlin til fólkaskúlaflokkar veðrur tikin av

**Tað kann fara at skaða kunnleikan, føroysk skúlabørn hava um egið land, um ferðastuðulin verður tikin burtur, sigur Katrin Dahl Jacobsen í viðmerkingum til fyrispurning á Løgtingi**

FYRISPURNINGUR
*Edvard Joensen*

Katrin Dahl Jacobsen, løgtingsmaður, vil hava Óla Holm, landsstýrismann við undirvísingar- og mentamálum, at siga sær, um tað er rætt, at ferðastuðulin til skúlabørn, sum ferðast við Standferðsluni og Bygdaleiðum, verður tikin burtur. Og um so er, vil Katrin Dahl Jacobsen eisini hava grundina at vita.

Hesum hevur hon boðað frá í einum fyrispurningi, hon hevur Óla Holm, landsstýrismanni, í tinginum.

Katrin Dahl Jacobsen spyr, hvussu leingi skipanin við ferðastuðuli til fólkaskúlaflokkar hevur virkað. Eisini vil hon vita, um tað er rætt, at stuðulsskipanin er skorin burtur, og hvør grundgevingin fyri tí er.

Í viðmerkingunum vísir Katrin Dahl Jacobsen á tann týdning, hesin ferðastuðulin hevur havt fyri skúlaflokkar, sum hava ferðast í Føroyum. Tað hevur alstóran týdning, sigur hon, at børnini læra sítt egna land at kenna, og tað kunnu tey lættliga við slíkum møguleikum at ferðast í landinum.

Tað er kortini ikki so, at tey hava ferðast frítt, men hava goldið annan vegin, vísir Katrin Dahl Jacobsen á. Verður hesin stuðulin nú tikin burtur, fer tað hels at merkja, at ferðingin innanlands fer at steðga, tí pengar fara at mangla í. Lærararnir hava tá bara tveir møguleikar at fáa pengar til ferðingina, um teir ikki skulu setast aftur. Annaðhvørt at krevja teir frá skúlunum ella frá foreldrunum. Og tað kann væl henda seg, vísir Katrin Dahl Jacobsen á, at tað manglar í hjá báðum pørtum frammanundan.

Tað verður avgjørt afturstig, um hesar ferðirnar halda uppat, vísir Katrin Dahl Jacobsen á. Hon vísir á setursskúlarnar, sum vanliga plaga at vera aðrastaðni enn í heimbygdini. Umframt at víðka sjónarringin hjá børnunm, er tað eisini sosialt mennandi fyri tey at sleppa at ferðast og búgva saman á slíkum ferðum, sigur Katrin Dahl Jacobsen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin í viðmerkingunum til fyrispurningin til Óla Holm, landsstýrismann við undirvísingar- og mentamálum.






# Vænta fleiri tilburðir av ILA

**Landsdjóralæknin og formaðurin í Havbúnaðarfelagnum vænta ikki, at hetta er seinasti tilburður av álvarsomu fiskasjúkuni ILA, sum vit fara at síggja í Føroyum. Sjúkan hevur longu breitt seg ov nógv**

ILA
*Stefan í Skorini*



*Alibrúkið hjá Gulanum í Nólsoyarfirði er tað seinasta í røðini, sum er rakt av ILA. Hans Jacobsen óttast fyri, at ILA smittan fer at breiða seg um alt landið. Torført er at basa smittuni, heldur Bjørn Harlou*

Mynd: Jens Kr. Vang

Seinasta alibrúkið í longu røðini at fáa ILA er Gulin, sum heldur til undir Argjalandinum í Nólsoyarfirði. Landsdjóralæknin hevur givið boð um at taka fiskin í teimum ringunum, sum eru fongdir við ILA.

Hetta er fimta alibrúkið í hálvtannað ár, sum verður rakt av herviligu fiskasjúkuni, ið verður mett sum tann mest álvarsama fiskasjúkan í ES-høpi.

Alarar hava ikki gjørt nóg mikið fyri at steðga sjúkuni, og tað er orsøkin til, at hon hevur breitt seg um meginpartin av Eysturoynni og nú til Nólsoyarfjørð. Hetta heldur Hans Jacobsen, ið er formaður í Føroya Havbúnaðarfelag.

Hann væntar, at enn fleiri alibrúk fara at fáa ILA virusið.

– Nei hetta er ikki seinasti tilburður av ILA. Sjálvandi vóni eg, at hetta ikki verður so, men nú er virusið farið so langt, at tað hevði verið ógvuliga løgið, um tað ikki finst í øðrum alibrúkum eisini, sigur Hans Jacobsen, ið sjálvur hevur alibrúk á Lambavík, har ILA er staðfest, men tó er sjúkan ikki brotin út enn.

Hann heldur annars ikki, at alarar og myndugleikar hava gjørt nóg nógv fyri at forða sjúkuni í at breiða seg. Alararnir vónaðu, at ILA ikki fór at breiða seg til onnur støð, men hetta er nú hent.

Hann heldur, at alarar altíð skulu hava eitt vakið eyga við ringunum og vera eitt fet frammanfyri sjúkuna, so teir kunnu avmarka skaðan.

– Neyðugt er at hava eina fasta mannagongd, so at fólk varnast virusið beinanvegin, sigur Hans Jacobsen. Hetta kundi verið gjørt soleiðis, at alarar við jøvnum millumbilum kannaðu síni alibrúk. Soleiðis høvdu teir altíð vitað, hvussu støðan er við fiskasjúkum.

Hann leggur dent á, at alarar skulu altíð vera vitandi um støðuna í alibrúkinum í sambandi við sjúku. Soleiðis slepst undan, at fiskur verður settur út, har smitta longu er í ringunum.

## Djóralæknin samdur

Bjørn Harlou, landsdjóralækni í Føroyum, er samdur við Hans. Hann heldur ikki, at hetta er seinasti tilburður av ILA í Føroyum. Hóast vísindamenn enn vita lítið um ILA virusið, so er smittuvandin stórur, og sjúkan breiðir seg skjótt.

Hann sigur, at ES metir hesa sjúkuna sum tað álvarsamastu. Tí setir felagsskapurin tað krav, at lond, ið senda fisk á ES-marknaðin, skulu gera sítt ítarsta fyri at fyribyrgja henni. Tað er Bjørn Harlou, ið gevur boð um at neyðslakta fiskin í ILA raktum alibrúkum.

Hann sigur, at tað er ein ógvuliga torfør uppgáva at forða ILA í at breiða seg út um landið. Hann vísir á, at enn vita vit ikki nóg mikið um smittuna, men sjálvandi eru tey alibrúk, ið ligga tættast við ILA rakt øki, í størri vanda.

Alarar fáa tó vanligan prís fyri laks við ILA sum frískan laks. Trupulleikin er tann, at alibrúkið skal leggjast stilt í langa tíð, áðrenn fiskur aftur kann setast út.

Bjørn Harlou heldur, at smittan kanska er spjadd um landið við brunnbátum. Hesir brunnbátar hava siglt millum alibrúkini, áðrenn nakar hevur varnast sjúkuna, og tá kunnu teir hava spjatt hana víða um. Eftir at ILA er staðfest, hava brunnbátarnir ikki havt frítt at fara um landið.

# Tryggingin er ávegis

**Alarar hava framvegis onga trygging ímóti ILA og fáa tí lítið ella einki endurgjald fyri mista inntøku. Tryggingin er tó ávegis eftir drúgvar samráðingar**

ILA
*Stefan í Skorini*

Alarar, ið verða raktir av ILA og tískil eru noyddir slakta fiskin í ringunum, fáa einki endurgjald frá tryggingarfeløgum.

Flestu alarar hava eina trygging móti sjúku, men hon tekur ikki við, um boð koma frá landsdjóralæknanum at taka fiskin. Við øðrum orðum er hon einki verd í sambandi við ILA.

Henda tryggingin er loksins á veg, eftir at Havbúnaðarfelagið við umboðum úr alivinnuni hava samráðst við Tryggingarfelagið Føroyar í eini tvey ár.

Alarar hava saman við landsstýrinum goldið í ein trygdargrunn, har einar 17 milliónir eru í dag. Hesin peningur munar tó lítið samanborið við tað tap, ið alarum er fyri, tá teir verða raktir av ILA. Tí er besta loysnin hjá alarunum at fáa sær eina trygging.

Higartil er eingin peningur útgoldin úr trygdargrunninum, og alarar hava borið byrðuna sjálvir.

## Ógreið lóggáva

Hans Jacobsen, formaður í Havbúnaðarfelagnum, sigur, at samráðingarngar byrjaðu, áðrenn ILA varð staðfest á Fuglafirði fyri fyrstu ferð í Føroyum. Reglur og lóggáva á hesum økinum vóru so ógreiðar, og tryggingarfelagið vildi hava greiðar mannagongdir og eina handlingsætlan at halda seg til, áðrenn talan kundi vera um at tekna tryggingar fyri ILA.

Beint eftir tær fyrstu samráðingarnar verður ILA so staðfest á Fuglafirði, og tað kann hava havt við sær, at tryggingarfelagið hvepti seg eitt sindur við at tekna tryggingarnar.

Nú heldur Hans, at alarar skjótt hava møguleika fyri at tekna tryggingar fyri ILA. Treytin er tó, at alibrúkið er ILA frítt, og alarin hevur eina sjálvsábyrgd, so at hann átekur sær ein stóran part av kostnaðinum sjálvur. Hans heldur tó, at henda tryggingin fer at vera á einum rímiligum støði.

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Suzuki Baleno 1,3 3h
km. 110.500, árg. mai 1996
50.000,-

Citroen BX 1,6 Selection
km. 55.000, árg. aug. 1992
60.000,-

Mitsubishi Pajero 3h
km. 208.000, árg. sep. 1986
52.000,-

Mitsubishi Lancer
km. 118.000, árg. juni 1992
50.000,-

Citroen ZX 1,4i 5h
km. 102.000, árg. aug. 1995
70.000,-

Ford Escort 1,8D CLX 4h
km. 187.000, árg. nov. 1995
51.000,-

Mitsubishi Galant 2,0 GTi
km. 170.000, árg. mai 1989
60.000,-

Kia Sportage 2,0i
km. 42.500, árg. okt. 1997
100.000,-

Nissan Primera 2,0 SLX 4h
km. 25.000, árg. aug. 1997
122.000,-

Mercedes Sprinter
km. 220.000, árg. mai. 1997
130.000,-

Mitsubishi Pajero 2,5 TD
km. 220.000, árg. okt. 1986
30.000,-

Ford Fiesta 1,8 Diesel
km. 140.000, árg. okt. 1991
45.000,-

Citroen Xantia stc. 1,8 TD
km. 140.000, árg. mar. 1998
140.000,-

Kia Pride
km. 26.900, árg. jan. 1998
60.000,-

Mitsubishi Lancer 5h
km. 117.000, árg. jan. 1992
45.000,-

Citroen Berlingo 1,9
km. 50.000, árg. jan. 1999
112.000,-

Mitsubishi Carisma 1,8 GDI
km. 62.000, árg. jan. 1998
125.000,-

BMW 318i
km. 27.000, árg. mar. 1999
205.000,-

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

Vælkomin til
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820